Bókaútgáva

»Úthavsdagar - Oceaniske dage«

Í sambandi vi› 100-ára dagin hjá Jørgen-Frantz Jacobsen tann 29.11. kemur bókin “Úthavsdagar - Oceaniske dage” út vi› greinum um ritverk hansara og um ta› hjá Williami Heinesen.

Har eru greinir um skaldsøguna og um filmin “Barbara”. Turi› Sigur›adóttir skrivar um essay og yrkisprosu hansara og Leyvoy Joensen l‡sir leiklutirnar hjá Jørgen-Frantz Jacobsen og Williami Heinesen í tjó›skaparligu menningini í 20. øld. Hanne Flohr Sørensen skrivar um bræva-skifti› millum høvundarnar.

Ritverki› hjá Williami Heinesen ver›ur vi›gjørt í fleiri greinum, m.a. eftir Torben Broström professari, sum skrivar um yrkingar hansara. Harafturat skriva Vár í Ólavsstovu um “Laterna magica” og Malan Marnersdóttir um “Tårnet ved verdens ende”.

Umframt fleiri a›rar greinir um bá›ar høvundarnar.

Bókin er úrslit av rá›stevnuni “Úthavsdagar” í Nor›urlandahúsinum 25.-27. maj í ár. Bókmentafrø›ingar, høvundar og bókmentaáhuga› úr Nor›urlondum tóku lut.

Ritstjórar eru Malan Marnersdóttir og Turi› Sigur›ardóttir.

Útgevari: Fró›skaparfelagi› og Nor›urlandahúsi›.

Bókin ver›ur at fáa í bókahandlunum og hjá Bókami›søluni: BMS@post.olivant.fo

Jens Jørgin Thorsen farin til himmals

Jens Jørgin Thorsen er farin avsta›
millum stjørnudust og stjørnutinnur.

Hann fl‡gur í leopardbuksum og leopard frakka.

Hann situr í fangi Abrahams og mimar sínar gla›u løtur
í happening og drekkur hvíta kúgvamjólk
og málar krussudullur á himnaveggum.

Málingin rennur eftir kjálkum, nøs og dryppar
úr hondum - eftir bringu, úr lagandi eygnakrókum -
málningaløgur fl‡tur eftir himnagøtum,
har vassandi himnabørn
tvassa í gulari, rey›ari og bláari máling.

Jens Jørgin hevur einglaveingir úr leopardsskinni,
sum bleiktra í himnavindum.
Skeinur eru allasta›ni -
rey›ar gular og bláar.
Øll laga og eru gla› og frøast,
tí Jens Jorgin gongur
fra dyr til dyr og mussar gomul og ung-
gamlar sveinar og ungu sprund
av himnaongum,
so rey›ur, gulur, bláur og grønur.

Sjálvur Várharra situr í skellilátri -
gulur, grønur og bláur.

Málingaløta er i Himmiríki.

Frits Johannesen

Tí›indaskriv frá Nor›urlandahúsinum

Klassiskar trioir

Hóskvøldi› 28. november 2000, kl. 19.30 ver›ur tri›ja konsertin av sjey í vetur hjá Or(eus , tónleikafelagi Nor›urlandahúsinum, og hesaferi ver›ur ta› DOGME- trioin, i› er manna› vi› trimum tónleikarum Alice Testrup, Danmark, klaver, Kanny Sambleben, violin og Ib Hermann, Danmark, cello.

Tey tr‡ spældu fyri fyrstu fer› saman í 1952. Tá lósu tey á konservatoriinum í Keypamannahavn. Tey hava gjøgnum árini øll tr‡ veri› sera virkin innan tónleik, og nú øll tr‡ eru pensionera›i, eru tey aftur farin at spæl saman.

Alice Testrup hevur veri› lærari á tí Kongaliga Danska Konservatoriinum, sum so mangir a›rir rayndir tónleikarar.

Kanny Sambleben var í sínari tí› fiólleikari í Sjællands Symfoniorkester, og seinni hevur hann veri› musikkskúlalærari í Føroyum.

Kanny og nor›ma›urin Magne Synnevåg tóku stig til at stovna Føroya Symfoniorkestur í 1983.

Ib Hermann hevur veri› celloleikari í Kongaliga Danska Kapellinum.

Navni› DOGME- trioin kemur av, at tey siga seg hava undirvíst fyri seg.

Á skránni á konsertin 30. november ver›a spæld verk eftir: Haydn, Beethoven og Brahms.

Tí›indaskriv frá Fró›skaparsetrinum og Fró›skaparfelagnum:

Almennur fyrilestur

Almennur fyrilestur ver›ur á Fiskirannsóknarstovuni mikukvøldi› 29. november 2000 kl. 20.00.

Í sambandi vi›, at UNESCO hevur tilnevnt ár 2000 sum altjó›a støddfrø›iár, heldur Petur Zachariassen, cand.scient, lektari á Náttúruvísindadeildini á Fró›skaparsetrinum, fyrilestur, i› hann kallar: Hvat var heimurin uttan Pytagoras?

Uttan støddfrø›i og tøknifrø›i er eitt nútímans samfelag púra lami›. Støddfrø›iligir formlar og myndlar eru lagdir í teldur og tól til at planleggja eftir, til at gera metingar vi› og til at st‡ra vi›. Hjá verkfrø›ingum, ve›urfrø›ingum, búskaparfrø›ingum og mongum ø›rum er støddfrø›in vor›in eitt ómissandi ambo› til at l‡sa og greina fyribrigdi í náttúru og samfelagi.

Í fyrilestrinum ver›ur hugleitt um ta›, i› ey›kennir støddfrø›ina sum vísindagrein, og um hvussu støddfrø›in í sjálvari sær hevur ment seg í øldir. Dømi ver›a tikin fram um spurningar, i› hava hugtiki› støddfrø›ingar, og hvussu er lagt til vi› n‡ggjum evnisøkjum, hugtøkum og hugsanaháttum. Eisini ver›ur nomi› vi›, hvussu óvissa og sannlíkindi hava fingi› støddfrø›iligan ham.

Sí eisini heimasí›una www.sleipnir.fo/setur/tiltoek

Plátufelagi› Tutl gevur í dag út savnsfløguna:

N‡ggj fløga frá Tutl

Fløgan kann sigast at vera eitt yvirlit yvir tónleikalívi› í Føroyum innan "folk/ethnic" nú vit eru á markinum til ta n‡ggja ártúsund.

Á fløguni eru 16 upptøkur frá 1975 til 2000. Allar hesar upptøkurnar eru at finna á ø›rum útgávum hjá Plátufelagnum Tutl, og eru tí eisini millum tær nú yvir 150 útgávurnar í Tutl kataloginum fyri 2001, sum ver›ur li›ugt um n‡ggjársleiti›.

Útgávunan inniheldur: Skjaldur, Enekk, Kári p, Annika Hoydal, Spælimenninir, Haldurs café, Ívar Bærentsen, Safir, Sula, Jógvan Andrias, Hanus G. Johansen, Rebekka & Spælimenninir, Sjómansrímur, Kingosangur og Kvæ›i.

Fløgan er komin í fløgubú›irnar og kostar Kr. 159,-

Bókaútgáva

Lúnskir undirstreymar

Fyrsti sjónleikurin eftir Hanus Kamban l‡sir skaldsins stø›u í einum rúmi, har tilveran er hótt av lúnskum undirstreymum.

Yrkjarin Hans Andrias Djurhuus hevur fingi› at vita, at hann sleppur á ársskei› á Danmarkar læraraháskúla fyri tri›ju fer›. Tískil halda hann og kona hansara Petra stórfingna veitslu fyri vinum og skyldfólkum.

Sjónleikurin Heystveingir tekur vi› leygardag fyrrapart dagin eftir veitsluna. Tey bæ›i Hjørdis Djurhuus – dóttir Janus skald – og Villi Magnussen fáast vi› at rudda upp inni hjá Hans Andriasi, me›an tey práta um, hvussu veitslan hevur gingi›. Umframt tey hitta vit í leikinum Hans Andrias, Petru og Janus skald. Men ta› er ikki fyrr enn rei›arin og handilsma›urin Sofus í Kollafir›i trínur inn á pallin, at onkur gøtan ver›ur ógrei› – og fer› kemur á leikin.

Fyrsti sjónleikurin eftir Hanus Kamban l‡sir skaldsins stø›u í einum rúmi, har ikki altí› er vítt til veggja, og har tilveran er hótt av lúnskum undirstreymum. Leikurin er spennandi og stuttligur, men eisini bersøgin og speiskur. Hann speglar aftur tey kreppuraktu tríatiárini – og okkara egnu tí›.

Yvir hendingunum – sum eitt fleyr av melankoli – dvølur nocturna 21 í C moll eftir tónaskaldi› Frédéric Chopin.

Ta› er Mentunargrunnur Studentafelagsins, sum gevur hesa bók út. Bókin er prenta› á Hestprenti. Permumyndina hevur listama›urin Marius Olsen gjørt. Heystveingir er 80 bla›sí›ur og kostar kr. 120.

Í hungursverkfalli á níggjunda degi

67 ára gamli Joen av Vollanum er farin í hungursverkfall, fyri at fáa uppreisn og endurgjald fyri ta lí›ing og forfylging, honun hevur veri › fyri á donskum sinnissjúkrahúsi. Hann b‡r nú í Havn

Jústinus Leivsson Eidesgaard

Á einum lítlum nossligum kamari í gistingarhúsinum Bláð‡pi›, Dr. Jacobsensgøta 14-16. í Havn, situr ein 67 ára gamal ma›ur. Hann er nokk so einsamallur í ver›ini. Í apríl mána›i fl‡ddi hann til Føroya, tí hann kendi seg forfylgdan av danska sjúkrahúsverkinum. Ma›urin er væl ílætin, n‡ráka›ur og angin av frískum barberspritti hongur í rúminum. Seinastu 18 árini hevur hann havt samband vi› psykiatrisku deild á Odensen Sjúkrahúsi og í Middelfart og hann metir seg ver›a skaddan av vi›fer›ini hann hevur fingi› á hesum deildum.

Ma›urin er blídlligur at tosa vi›, er heilt ni›ri á jør›ini, tá vit tosa um vanligar gerandis hendingar, men hevur hug at gerast eitt sindur beiskur og vrei›ur, tá vit nærkast, hvussu hann hevur havt ta› í samband vi› tilkn‡ti til psykiatrisku deild á sjúkrahúsinum í Odense og í Middelfart.

Joen av Vollanum hevur ongantí› havt samband vi› psykiatrisku deild á landssjúkrahúsinum og beiskleikin er ikki vendur móti Føroyum. Hann kennir seg skeivt vi›farnan av danska heilsuverkinum og tí hevur hann sum seinasta útveg avgjørt at fara í hungursverkfall, fyri at fáa uppreisn og endurgjald. Og hann hevur ongar ætlanir um at leska ein bita aftur, fyrr enn danski løgmálará›harrin Frank Jensen, vegna samfelagi›, hevur bøtt ska›an aftur.

Kunna› pressuna

24. februar í fjør sendir Joen av Vollanum danska løgmálará›harranum,

Frank Jensen, eitt skriv, har hann grei›ir frá hvussu hann er vi›farin av danska heilsuverkinum og danska politinum sum seinastu níggju árini.

Hann byrjar brævi› vi› at grei›a frá hvussu politii› hevur hildi› eyguni vi› honum fyrru helvt av nítiárunum og hvussu hetta enda›i vi›, at hann var› tvanginnlagdur á psykiatrisku deilt á Odensen sjúkrahúsi.

Sí›an grei›ir hann frá hvussu hann, uttan sjálvur at geva loyvi ver›ur tvangsvi›gjørdur vi› nervaheilivági. Hann heldur, at heilin hevur tiki› ska›a av hesi vi›ger› og at hann í dag er munandi verri fyri, enn tá hann var› tvangsinnlagdur.

Droymdi um hús

– Ætlanin var ongantí›, at eg skuldi fl‡ggja til Føroya. Eg droymdi um at keypa mær eini eldri hús í Føroyum og sí›an búgva her einar tveir til tríggjar mána›ar um árinum, nú eg eri pensionera›ur. Eg eri í dag 67 og flutti til Danmarkar fyri 47 árum sí›an. Men eg kann ikki búgva longur í Danmark, tí eg kenni, at eg havi tiki› ska›a at tí vi›fer›, eg havi fingi› av danska politinum og heilsuverkinum, sigur Joen av Vollanum.

Joen er útbúgvin maskinmeistari. Hann lærdi fyrst á Skála Skipasmi›ju og fór sí›an ni›ur á verksmi›juna, sum gjørdi Alpha Diesel í Fredrikshavn. Sí›an flutti hann til Odense, har hann tók maskinmeistaraútbúgvingina. Hann hevur siglt úti í fleiri ár. Í Odense var› hann giftur og hann eigur børn og barnabørn.

– Hóast eg havi veri› út fyri nógvum í samband vi› psykiatrisku deildirnar í Odense og Middelfart, so hava børnini framvegis vir›ing fyri mær. Sama kann eg siga um familjuna annars. sigur hann.

Má fáa ein enda

– Hendan forfylging, sum eg kenni mær hevur veri› fyri og sum heldur fram, má fáa ein enda, kosta hvat ta› vil. Tí eri eg farin í hungursverkfall vi› vón um at okkurt positivt spyrst burturúr.

– Eg havi ikki leska bitan sí›an seinasta t‡sdag klokkan 18:00. Eg veit, at hetta er álvarsligt fyri meg, tí eg havi eisini gamlamanna sukursjúku. Eg eri ikki serliga svangur, men eg lætni nógv. Eg eri veikari í dag, enn fyri eini viku sí›an, men enn orki eg at ganga mær ein túr, sigur Joen av Vollanum.

Er tú bangin fyri at blíva tvangsinnlagdur í Føroyum?

– Nei, ta› eri eg ikki, eg havi einki útistandandi vi› føroyingar. Ta› er danska heilsuverki› eg strí›ist í móti, sigur Joen av Vollanum.

Er tú ikki bangin fyri at doyggja, um tú ikki etir?

– Dey›in er sjálvandi seinasti útvegur, sum eg ikki óttist. Sum sagt, hendan forfylging aftur mær má fáa ein enda, kunnu onnur ikki finna loysnina, so má eg finna hana sjálvur.





Politii› kann onki gera

Jústinus Leivsson Eidesgaard

Vakthavandi á politistø›ini í Havn sigur, at um ein persónur velir at fara í hungursverkfall, so er ta› einki politii› kann gera vi› ta›.

– Fólk hava sín fría vilja og ta› er ongin lóg her á landi sum sigur, at fólk ikki hava loyvi at fara í hungursverkfall, sigur vakthavandi á politistø›ini í Havn, tá vit tosa›u vi› hann mánadagin.

– Men sjálvandi, vit fara at halda eyguni vi› manninum, sigur hann.

Sjálvdan innløgd uttan grund

Jústinus Leivsson Eidesgaard

Ta› finnst ein lóg, sum ger reglur fyr, nær ein kann vera tvangsinnlagdur ella ikki. Talan er um grei›ar reglur. Lógin sigur í høvu›sheitinum, at um talan er um ein sjúkan persón, sum vegna sína sjúku kann gera seg inn á seg sjálvan og onnur, so er grund fyri innleggjan.

Tveir óhefir læknar skulu siga gott fyri, at ein persónur ver›ur tvangsinnlagdur. Kærumyndugleikin er løgmálará›harrin og í 99 prosent av førunum gevur hann læknunum vi›hald.